## Tilvildarligur fiskiskapur



Í íslendska reiðarafelagnum harmast menn um, at umleið tjúgu útlendskir trolarar komu á Reykjanesryggin í august og september at royna eftir kongafiski, hóast tað í fjør eydnaðist at fáa semju um at royna har um várið og tíðliga um summarið. Stjórin í íslendska reiðarafelagnym, Friðrik J. Arngrímsson, sigur við blaðið Fiskifréttir, at viðurskiftini eru tilvildarlig, og at í veruleikanum er einki eftirlit við fiskiskapinum á Reykjanesrygginum.

## Frank Jensen nøgdur

Líkt er til, at danir og grønlendingar eru komnir nærri einari semju í sjálvsstýrisnevndini eftir ein fund í Keypmannahavn í gjár. Formaðurin í búskaparliga arbeiðsbólkinum, Frank Jensen, sigur við KNR, at fundurin var sera góður. Partarnir umrøddu krøvini hjá hvør øðrum, og teir fara nú at kunna tað politiska baklandið. Ein av teimum stóru spurningunum er, um inntøkurnar hjá DONG í Grønlandi skulu mótroknast í roknskapinum landanna millum.

# Tey flettu á Røktar-og E

**- Hetta var ein sera hugnalig løta, sum staðfesti, at tað ber til at skapa upplivingar, eisini á einum røktarheimi. Hetta var eisini ein løta sum prógvaði, hvønn týdning eitt slíkt tiltak hevur á trivnaðin hjá teimum, ið búleikast á einum slíkum heimi, sigur leiðarin, Tordur J. Niclasen**

UPPLIVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikudagin 17. oktober høvdu búfólk, starvsfólk, avvarðandi og flettingarfólk ein serligan dag á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi. Hendan dagin vórðu tveir seyðir flettir inni á heiminum, og hetta tiltak hevði stóran áhuga milllum búfólkini.

Nógvar myndir vórðu tiknar, sum vit á Sosialinum kunnu gleða búfólk, starvsfólk og tey avvarðandi við.

### Upplivingarløta

Leiðarin á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, Tordur J. Niclasen, sigur, at hugskotið byggir á at fáa tær løturnar, sum hesi fólk í sínari tíð høvdu, inn í teirra nýggja umhvørvi.

- Vit kunnu siga, at endamálið við hesum er at fáa hesar upplivingarnar inn á heimið – tær upplivingar, sum fleiri av hesum fólkum eru von við frá barnbeini av.

Hann sigur, at nakað áðrenn fjøllini vórðu gingin, varð tosað um, hví vit ikki fóru at fletta nøkur lomb á Røtar-og Ellisheiminum?

Tordur sigur, at tann sera virkni ergoterapeuturin Heidi, sum starvast á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi, fór beinanvegin í gongd og setti seg í samband við Jákup Hansen í Søldarfirði, sum meira enn fegin vildi átaka sær at fletta.

Jákup vitjar sjálvur javnan á heiminum.

- Húsavørðurin av Strondum fekk tvey gimburlomb til vega frá bóndanum Innan Glyvur, og síðan varð farið í gongd.

### Stórur áhugi

Tordur J. Niclasen sigur, at fitt av fólki – bæði kvinnur og menn – vóru samankomin í ergoterapiini, tá ið slaktið fór fram.

- Dúgliga varð prátað, og viðmerkingarnar vóru nógvar, meðan flettingin stóð uppá.



*Tummað verður*

Hann sigur, at tað fyrsta, sum fólk gjørdu vart við, var lukturin – seyðalukturin, sum dróg tankarnar hjá fleiri aftur í tíðina, tá flett varð inni í køkinum, og lukturin stóð um alt húsið.

Leiðarin sigur, at flettingarmaðurin Jákup, fekk onkur góð ráð og eisini onkra viðmerking, tá hann gjørdi øðrvísi, enn onkur var vanur við.

- Tá ið Jákup so spurdi, um hesin, sum kom við ráðunum, skuldi draga sperðilin, vóru konufólkini skjótar at svara, at sjálvandi tað skuldi hann tað!

Spenningurin var óførur, tá ið vigast skuldi og dúgliga varð gitt.

- Jú, jú um tey 25 pundini - og so var. Annað vigaði sløk 26 pund og hitt sløk 25 pund.

Tordu J. Niclasen sigur, at hetta var ein sera hugnalig, gevandi upplivingarrík løta saman við búfólki, starvsfólki og onkrum avvarðandi.

### Tað ber til...

- Hetta var ein løta, sum staðfesti, at tað ber til at skapa upplivingar av slíkum slagi, eisini á einum røktarheimi. Hetta var eisini ein løta, sum prógvaði, hvønn týdning eitt slíkt tiltak hevur á trivnaðin hjá teimum, ið búleikast á slíkum heimi, sigur leiðarin.

Krovini hanga nú í hjallinum á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, og eingin ivi er um, at tey fara at gagnast mongum væl, helst betri enn vanligt.



*Jákup Pauli rættir eina hjálpandi hond*



*Flettarin og fyristøðmaðurin saman við starvsfelaga sínum Axel Johannsen*



*Andrias í Tarti - 100 ára gamal - ger metingar av krovinum*